## Frælsi í hálsbandi við lumma

Frælsi í Dós hevur verið ein av ímyndunum hjá Kalli, síðan dósin fyrstu ferð kom á marknaðin fyri skjótt fýra árum síðani, skrivar felagið í tíðindaskrivi. Torført er at fáa hendur á upprunadósini, so Kall hevur valt at skifta dósina út við eitt hálsband við einum fartelefonlumma í. Í lummanum finst júst tað sama, sum áður var í dósini, nevniliga SIM-kort við fartelefonnummari, talutíðarkort við 100 krónum, skrásetingarseðil, sum hevur virði á 25 kr., og Frælsi vegleiðingin. Nýggi pakkin, sum er framleiddur í avmarkaðari nøgd, kom á marknaðin hósdagin 6. desembur og kostar tað sama sum dósin.



# Fleiri fiskavirkir høvd

**Sambært roknskapargreiningini, sum Rasmussen & Weihe hava gjørt, hava fleiri fiskavirkir aftur havt hall í 2006. Ráfiskurin er dýrur, rentan er hækkað, og virkini hava ikki megnað at fáa meira burtur úr fiskinum**

RAKSTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Bjarni Arnason vísti á, at hækkandi ráfiskaprísir, lønarútreiðslur og rentuhækkingar seta krøv til virðisøking í fiskavirkisvinnuni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



Í nøkur fylgjandi ár hava fleiri føroysk fiskavirkir havt hall – og stór hall. Talan er ikki bara um tey smáu feløgini, sum hava fiskaframleiðslu, men eisini um tey stóru og størstu.

Seinastu árini hevur grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe gjørt eina sonevnda roknskapargreining av fiskiskipaflotanum yvir 110 brt.

Felagið hevur eisini hugt uppá, hvussu gongdin er hjá fiskavirkjunum. Øll virkir eru tó ikki við í hesi greining, og færri eru við í 2006 enn undanfarin ár.

Sum skilst, eru tað ikki øll fiskavirkir, sum hava so góðan hug at verða við, og tí hevur grannskoðarafelagið ikki fingið neyðuga taltilfarið.

Virkini, sum vóru við í greiningini fyri 2005, umboðaðu út við 80% av ráfiskinum, sum verður landaður og virkaður í Føroyum.

Í greiningini fyri 2006 umboðaðu virkini, sum vóru við, stívliga 60% av landaða ráfiskinum.

Tað er so hóast alt ein stórur helmingur.

### 7 miljónir í halli

Í stuttum kann sigast, at nógv føroysk fiskavirki »duga« ikki at tjena pening – ella sagt við øðrum orðum: Tey duga ikki at skapa ta virðisøking, sum skal til fyri at fáa fleiri krónur burtur úr hvørjum kilo av ráfiski.

Tá ið eingin virðisøking er, samstundis sum fiskurin er dýrur, og rentan er hækkandi, kann ikki roknast við nøkrum serligum úrsliti.

Og úrslitini eru heldur einki at reypa av.

Tey sjey feløgini, sum Rasmussen & Weihe hava við í síni greining fyri 2006, hava eitt samanlagt hall upp á stívliga 7 miljónir krónur.



*- Fiskavirkini gjalda ótrúliga væl. Tað skulu tey eiga, sigur Jónsvein Knudsen, útgerðarmaður hjá fleiri ísfiskatrolarum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Størstu feløgini, sum eru við í hesi greining, eru Faroe Seafood og Kósin.

Vit hava tó ikki sæð úrslitini hjá hvørjum einstøkum felag sær.

Tað kann tykjast eitt sindur undarligt, at gongdin hjá hesum virkjum er, sum hon er.

Eitt av feløgunum, sum ikki er við í greiningini, er Tavan í Leirvík, sum arbeiðir upsa í vetrarhálvuni og gulllaks í summarhálvuni.

### Tavan setir met

Fiskavirkið í Leirvík hevði nevniliga sítt besta ár í 2006, tá ið felagið hevði eitt avlop upp á heilar 7,5 miljónir krónur.

Í 2004 og 2005 var avlopið hjá felagnum eftir skatt ávikavist 1,6 og 3,4 miljónir krónur.

Hetta merkir, at somu ár (2004, 2005 og 2006), sum fleiri fiskavirkir hava havt stór hall í rakstrinum, hevur Tavan í Leirvík havt eitt avlop eftir skatt upp á tilsamans 12,5 miljónir krónur.

Nógvar orsøkir kunnu vera til, at gongdin hjá virkjunum er so misjøvn, men eitt er kombinatiónin av framleiðsluni.

Stjórin í Tavuni, Jóan Magnus Rasmussen, hevur áður sagt, at teir duga einki, sum hini virkini ikki duga.

- Vit arbeiða bara upsa í vetrarhálvuni, og eg trúgvi, at tá fáa aðrir tað eisini at bera til, sigur hann lítillátin.

### Virkini gjalda væl

Á framløgufundinum, sum grannskoðarafelagið skipaði fyri í síðstu viku, segði Bjarni Arnason, ið hevur staðið á odda fyri greiningini, at gjaldførið hjá fleiri